# UMFAR

## FAKTA um reglurnar

GREIN 33. Dómarin kannar eisini eftir, um alt er í lagi, áðrenn dystur byrjar.
Stk. 2. Um dómarin heldur, at vøllurin er í slíkum standi, at at tað kann vera vandamikið at leika á honum, kann hann gera av, at dysturin ikki skal verða leiktur. Dómarin kann, í samráð við liðskipara, steðga dysti, ið verður leiktur, orsakað av vánaligum líkindum. Dysturin kann í mesta lagi verða útsettur í ein tíma. Fráboðan um hetta skal beinanvegin gevast Kappingarnevndini, sum ásetur nýggjan dyst.



# Nýggjur dystur má til

**FÓTBÓLTUR – Lógarverkið hjá Fótbóltssambandinum krevur, at nýggjur dystur verður spældur, um dómarin velur at steðga honum, orsakað av eitt nú veðrinum, sigur Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini hjá FSF**

Grein 33, stykki 2, er tann parturin av lógarverkinum hjá Fótbóltssambandinum, sum Karl Vidtfeldt vísir til, tá hann skal greiða frá avgerðini um, at avblásti dysturin millum NSÍ og ÍF skuldi spælast av nýggjum.

– Lógarverkið krevur hetta og vit hava heldur ikki aðrar møguleikar, sigur Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini.

Hann vísir síðani á, at fordømi eru um líknandi støður, har dystir eru blástir av og síðani byrjaðir av nýggjum seinni – eisini dystir, har mál eru skorað.

Karl Vidtfeldt nevnir síðani ein dyst millum B68 og B36 í 2002. B36 var á odda 1-3 og fekk tillutað eitt brotsspark. Men vindurin bleiv so nógvur og bólturin vildi ikki liggja stillur, tá brotssparkið skuldi takast, so dómarin brísklaði dystin av.

– Tá høvdu vit ein jurist inni í myndini og hann kom fram til, at vit ikki høvdu aðrar møguleikar at áseta nýggjan dyst, greiðir Karl Vidtfeldt frá.

*rolant@sosialurin.fo*

av, var veðrið faktiskt betri, enn tá dysturin varð brikslaður í gongd. Og tíggju minuttir seinni var vøllurin grønur og vit høvdu frálík fótbóltslíkindi restina av kvøldinum, greiðir Pauli Poulsen frá.

Ikki tí, Pauli Poulsen heldur tað ikki vera órímiligt, at dómarin valdi at steðga dystinum. Men hann undrast yvir, at tey ikki fingu møguleikan at rudda vøllin.

– Høvdu vit fingið fimm minuttir at rudda linjurnar, so høvdu vit havt ein reinan vøll og bláan himmal. Men vit verða ongantíð hoyrdir í hesum málinum, ger Pauli Poulsen greitt.

Ransin N. Djurhuus sigur sjálvur, at hann ikki ráðførdi seg við liðformenninar, tá hann gjørdi av at steðga dystinum.

– Eg greiddi teimum frá, at eg hevði tveir møguleikar sum støðan var. Fyrri møguleikin var at fáa fólk at rudda vøllin og vóna, at veðrið fór at batna. Seinni møguleikin var at steðga dystinum, og tað var henda møguleikan, eg valdi, greiðir hann frá.

Spurdur um, tað ikki hevði verið rætt at steðgað dystinum eina løtu, meðan vøllurin varð ruddaður, svarar Ransin N. Djurhuus, at tað ikki var til at siga, hvussu veðrið fór at verða.

– So skalt tú satsa og tað gjørdi eg ikki. Tað var eisini kalt tá, og so kanst tú spyrja teg sjálvan, hvussu leingi tú kanst hála menn út og inn av vøllinum, meðan tú bíðar eftir veðrinum, sigur Ransin N. Djurhuus.

### Øðrvísi uttanlands

Pauli Poulsen skilir kortini ikki avgerðina hjá Ransin N. Djurhuus. Hann vísir á, at tað er púra vanlig mannagongd uttanlands, at dystir verða steðgaðir eina løtu fyri at gera linjurnar sjónligar, ella tí at eitt nú roykur fyllir stadion. Hetta var ikki støðan við Løkin, og tískil kom tað sera óvart á hann, at dysturin eisini skuldi spælast av nýggjum.

– Uttanlands er tað einki óvanligt í at taka dystir uppaftur, har teir vórðu sleptir, vísir Pauli Poulsen á. Men sum tað sæst aðrastaðni á hesum síðum, so hevur Fótbóltssambandið ikki aðrar møguleikar enn at áseta nýggjan dyst.

Hinvegin sæst eisini, at sama reglugerð gevur dómaranum møguleika at steðga dystinum í ein heilan tíma, áðrenn hann verður tikin uppaftur. Tað høvdu fleiri í Runavík helst sett prís upp á, um dómarin gjørdi í Runavík hetta kvøldið. Um ikki annað, so ein hálvan tíma ella eitt korter.

So var ikki og dysturin varð – eins og allir hinir í fyrsta umfari – síðani spældur skírisdag. Tá var ÍF omaná og vann 1-2. Sama úrslit var við Margáir í Streymnesi, har B36 var omaná. Hetta vóru teir báðir dystirnir við fægst málum, tí á Toftum vann B68 5-0 á B71, meðan heili átta mál komu bæði í Gøtu og í Gundadali í Havn

Heilt óvæntað fekk FC Suðuroy javnleik við at spæla 4-4 ímóti HB, meðan Víkingur setti AB upp á pláss og vann 5-3.

*rolant@sosialurin.fo*

# Líkist endurtøku hjá kvinnunum

**FÓTBÓLTUR Tey bæði liðini, sum alt kappingarárið í fjør vóru í fremstu røð, KÍ og AB, løgdu fyri við stórsigrum skírisdag, so tað kundi bent á eitt sama slag kappingarár aftur í ár**



**KAPPINGARNEYTAR**

*AB og KÍ stríddust í fjør um meistaraheitið. Líkt er til, at tað fer at endurtaka seg í ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hilmar Jan Hansen

Ætlanin var, at føroyameistararnir í KÍ skuldu taka ímóti steypavinnarunum í AB í Klaksvík í gjár, men veðrið gjørdi, at allir tríggir kvinnudystirnir blivu avlýstir. Sostatt má bíðast til í kvøld klokkan 18, áðrenn tað fæst at síggja, hvat av hesum báðum liðunum hevur munin í ár.

Í fjør eydnaðist AB at vinna á KÍ í steypafinaluni, umframt at tað í landskappingini gekk sera javnt á allan vegin, so KÍ ikki fyrr enn í næstsíðsta umfarinum sleppa avgerandi framum og tryggjaði sær føroyameistaraheitið, við júst at vinna á AB. Forrestin var tað ein dystur, ið fyrst varð blástur í gongd ein sunnudag, men ikki kundi spælast fyrr enn dagin eftir, tí veður og vindur argaði...

At tað eisini í ár verða hesi bæði, tað nógva kemur at snúgva seg um, tá vit tosa um oddastríð í bestu kvinnudeildini, eru allar ábendingar um, hóast kappingin enn er so ung, at bara eitt umfar hevur verið.

Skírisdag vóru KÍ-kvinnurnar í Miðvági, tí kavi á vøllinum forðaði fyri, at dysturin kundi spælast í Klaksvík, sum dystarskráin annars segði. Tær í KÍ vóru náðileysar og vunnu 14-0 á uppflytarunum í MB, eftir at hálvleiksstøðan hevði verið 3-0. Samstundis vunnu AB-kvinnurnar á heimavølli 7-0 á EB/Streymi, harav seks av málunum komu eftir steðgin.

Víkingur, sum í fjør vann bronsu, fór væntandi at bjóða av, men tað sær út til at vera meiri enn bara ivasamt, um nakað spyrst burtur úr tí í ár. Víkingur tók skírisdag ímóti Skála, sum í fjør var nummar fýra, og Skála gjørdi her bart og vann 3-2 – enntá við sigursmáli í evstu løtu. So fáa vit at síggja, um Skála eisini er í ferð við at menna seg til ein avbjóðara heilt har frammi.

*einslistir@kallnet.fo*